## Real-met til Raul

Í 45 ár hevur Alfredo di Stéfano við sínum 307 málum havt málmetið í Real Madrid. Men um vikuskiftið mátti nú 82 ára gamla legendan ásanna, at ein yngri legenda hevur tikið metið. Raul javnaði metið fyri tveimum vikum síðani, og í 4-0 sigrinum móti Gijon skoraði Raul tvær ferðir, og lítil ivi er um, at hann nú verður methavari í hampuliga nógv ár·



## Huntelaar á talvuna

Hollendski Klaas Jan Huntelaar skeyt um vikuskiftið sítt fyrsta mál fyri Real Madrid. Hollendski áleyparin hevur havt tað trupult, síðani hann um ársskiftið flutti til kongaliga spanska felagið, men eftir 35 minuttum av dystinum móti Gijon bragdaði loksins. Real Madrid vann dystin 4-0, og minkaðu teir soleiðis um munin upp til Barcelona, sum spældi 2-2 javnleik móti Betis.

ÍF-SÍ 3-1 (25-22, 21-25, 25-17, 25-19)

# Fuglfirðingar fingu upp á træið

**Í einari mansfinalu, ið var meira merkt av feilum enn flótandi spæli, var ÍF betra liðið og vann uppibornan sigur. Fuglfirðingar, sum frammanundan høvdu tryggjað sær føroyameistaraheitið, hava sostatt við steypasigrinum omaná tikið greipuna í vetur**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Rúni Weihe var heilt stóri spælarin í mansfinaluni. Her slær hann enn ein av sínum mongu bóltum móti gólvinum hjá SÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ei undur í, at lagið mundi vera av tí allarbesta í Fuglafirði leygarkvøldið. Í manskappingini í flogbólti vetur hevur eingin verið yvir og eingin við síðuna av ÍF, og serliga tey bæði síðstu settini í mansfinaluni ímóti SÍ staðfestu, at fuglfirðingar ikki av ongum kunnu kalla seg greipuvinnarar.

Tað var eisini fyri neyðini, at ÍF fekk víst eitt sindur av sínum dygdum í teimum báðum síðstu settunum, tí annars hevði lítið verið at goymt sær í minninum frá mansfinaluni. Til tað var hon í alt ov stóran mun merkt av feilum og mistøkum, meðan tað flótandi spælið í longum løtum læt bíða eftir sær.

Serliga var hetta skorið út í papp, tí kvinnufinalan frammanundan hevði havt alt tað, ein góð finala skal hava: Har var spenningur til tað síðsta, gott spæl fyri tað mesta og tvey lið, ið tóktust hóska sera væl saman, tá nú ein branddystur skuldi fáast burtur úr tí, ein altíð ynskir sær av einari finalu.

Í mansfinaluni var bert okkurt hendinga bil spenningur í, og tíverri skuldi tað aftaná vísa seg, at mest hárreisandi løtan var síðst í fyrsta setti, tá SÍ mundi fingið ÍF aftur. Størsti dramatikkurin var næstan, tá ÍF mitt í hesum sama fyrsta setti misti Hans Toftegaard, sum skaddur noyddist av vølli…

### Nógvir servufeilir

Sum fleiri av spælarunum eisini viðgingu eftir dystin, var feilprosentið í servunum hjá báðum liðum væl oman fyri tað vanliga, og tí spurdist ikki so nógv spæl burturúr, sum ynskiligt hevði verið. Tað var tí sera sjáldan, at vit sóu tær drúgvu duellirnar, ið kunnu taka ein finaludyst burtur úr rúgvuni av dystum, ið verða spældir gjøgnum allan veturin.

At spælt var við einum nýggjum slagi av bólti í finaluni, ið ferðast øðrvísi enn teir vanligu, var helst ein partur av orsøkini, men ikki øll orsøkin. Kvinnurnar megnaðu við somu bóltum at fáa ein heilt annan dyst burturúr, so tað sigur ikki alla søguna – heldur ikki, hóast kraftmiklaru mansservurnar óivað eru ein størri avbjóðing við einum skjótari bólti.

Nokk so javnt gekk á í teimum báðum fyrstu settunum, har ÍF tó átti munin í tí fyrra og SÍ í tí seinna. Men í teimum báðum síðstu settunum fingu vit tó sjón fyri søgn, at ÍF er besta liðið av øllum í vetur, tí tá riggaði mestsum alt hjá fuglfirðingum, og so eru teir ikki til at steðga.

### Meira tendraðir

Hinvegin riggaði lítið hjá sørvingum, sum í teimum báðum síðstu settunum fyri ein stóran part vóru statistar í ÍF-leikinum, hvørs handrit legði upp til ein sterkan blokk og drepandi smasj, ið vit serliga sóu frá Rúna Weihe, men eisini øðrum, ið bjóðaðu seg fram og tordu alsamt meira, so hvørt sum sigurin sá út til at vera ávegis.

Tá so SÍ royndi at spæla seg upp og svara aftur, var tað við alt ov lítlum hugflogi. ÍF hevði ongar trupulleikar frammi við netið, og hóast blokkurin ofta var tíðliga uppi, høvdu sørvingar ein tendens til at smekka bóltin hart í hendurnar hinu megin netið, heldur enn at royna at sníkja seg rundan um blokkin.

Fuglfirðingar vóru meira tendraðir og grammari, ofraðu seg meira og meira, og tað trekti tennirnar úr SÍ, hvørs spæl var alsamt meira merkt av vónloysi og vantandi hugflogi, sum dystinum leið.

Tí kann ÍF fegnast um at hava fingið greipuna upp á træið, og við einum føroyameistaraheiti í ótíð og einum samanumtikið sannførandi steypasigri er eingin sum helst ivi um, at ÍF eigur væl og virðiliga besta mansliðið í vetur. Tillukku við tí!

## Út við skaða í fyrsta setti



Fyri Hans Toftegaard gjørdist mansfinalan leygardagin ikki tann stóra upplivingin, hóast hann sjálvandi var fegin um, at ÍF vann. Hann var nevniliga so óheppin at fáa ein skaða í fyrsta setti, og eftir tað gekk hann við vinstra fótliði innvavdum í bindi og ísi.

– Eg leyp upp og í tí eg setti av, fór fótliðurin av lagi, so har var einki meira hjá mær at gera í hasum dystinum. Eg veit ikki, um hetta kanska er eitt tekin uppá, at nú er tíð at gevast. Tú sæst sjálvur, at tað er ivasamt, um teir fara at sakna meg, um eg gevist nú, sigur Hans við einum skálkabrosi – sipandi til, at ÍF megnaði at vinna dystin, hóast hann bert spældi eitt hálvt sett.

Hans Toftegaard var kortini væl nøgdur við tað, hann kundi sita og eygleiða frá síðulinjuni:

– Eg haldi, at vit høvdu fleiri streingir at spæla uppá, og eg veit ikki, um tað nakrantíð fyrr hevur verið so breitt hjá okkum, sum nú, tí vit hava næstan tveir spælarar til øll pláss á vøllinum. Ein munur í finaluni var nokk, at breiddin hjá okkum var betri enn hjá SÍ, sigur hann.

-hil